# Hava ikki kravt 70% í lønarhækking

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

Í verkfallinum hjá Skipara- og Navigatørfelagnum, sum rakar øll tey almennu skipini, hevur nógv verið tosað um løn og lønarkrøv. Niðanfyri ger felagið upp, hvørji krøvini eru, og. Samstundis verður gjørt upp, hvussu stór lønin er í dag, so at ein og hvør kann samanbera tølini.Við hesum vil Skipara- og Navigatørfelagið vísa aftur tí, sum Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevurført fram um, at felagið í summum førum hevur kravt yvir 70% í lønarhækking.

### Krøv til lønina hjá skiparanum:

Frá 01.03.2002 skal skiparin verða løntur í lønarflokki 34.1.

Haraftrat skal hann hava eina viðbót, ið er munurin millum 30.000 krónur og lønarflokk 34.1, sum er 28.528,08 krónur, ella 1.471,92 krónur.

Frá 01.03.2003 skal skiparin vera løntur í lønarflokki 35.1 sum er 31.712,68 krónur um mánaðin..

Í løtuni er byrjunarløn hjá skiparanum á Tjaldrinum 22.378,52 krónur og endalønin er 23.769,98 krónur.

Lønin hjá skiparanum á Brimli er 8,4% hægri og hjá honum er byrjunarløn 24.258,32 krónur og endalønin, 25.766,66 krónur.

### Krøv til lønina hjá yvirstýrimonnum

Tann 01.03.2002 skal yvirstýrimaður vera løntur í lønarflokkki 31.1, sum er 24.661,96 krónur. Haraftrat skal hann hava eina viðbót, ið er munurin millum tær 24.661,96 krónurnar og lønarflokk 32.2, sum er 26.903,39 krónur.

Frá 01.03.2003 skal hann vera løntur í lønarflokki 33.1, sum gevur 28.184,76 um mánaðin.

Í løtuni er byrjunarlønin hjá yvirstýrimanninum á Tjaldrinum 20.589,49 krónur og endalønin er 21.980,96 krónur.

Á Brimli er lønin 8,4% hægri og byrjunarlønin hjá yvirstýrimanninum á Brimli er 22.319,01 krónur og endalønin átta ár seinni, er 23.827,36 krónur



*Lønarkravið er verri enn so helvtin av tí, sum Karsten Hansen hevur roknað seg fram til, sigur Skipara og Navigatørfelagið*

### Krøv lønina hjá 1. stýrimonnum

Frá 01.03.2002: skal 1. stýrimaður vera løntur í lønarflokki 29.1, sum gevur 24.361,39 krónur í løn. Haraftrat skal hann hava eina viðbót, ið er munurin millum tær 24.361,39 krónurnar og lønarflokk 32.1, sum er 25.981,52 krónur, ella 1620,13 krónur í viðbót.

Frá 01.03.2003 skal hann vera løntur í lønarflokki 32.2, sum gevur 27.575,98 krónur um mánaðin.

Byrjunarlønin hjá 1. stýrimanni á Tjaldrinum er 19.993,15 krónur og endalønin er 21.583,39 krónur.

Umborð á Brimli er lønin 8,4% hægri og byrjunarlønin hjá 1. stýrimanni á Brimli er 21.672,57 krónur og endalønin 8 ár seinni er 23.396,39 krónur.

### Semingsuppskotið

Fyri heilt at kunna gera samanberingina lidna, verður her sett upp, hvussu semingsuppskotið ljóðaði, sum Fíggjarmálastýrið goðtók, men Skipara- og Navigatørfelagið vrakaði.

Skiparar og stýrimenn verða eftir starvsaldri flokkaðir sambært lønartalvuni fyri tænastumenn soleiðis:

Skipari skal lønast í 34. lønarflokki og skal fáa 28.528,08 krónur um mánaðin.

Yvirstýrimaður skal lønast í 30. lønarflokki, umframt starvsaldur. Í fyrstuni skuldu teir fáa 24.241,18 krónur um mánaðin, men síðani 25.107,52 krónur um mánaðin, tá ið starvsaldurin hækkar og síðani aftur upp í 25.981,52 krónur, tá ið starvsaldurin hækkar enn meiri.

Eftir semingsuppskotinum, skuldi 1. stýrimaður verða løntur í 27. lønarflokki umframt starvsaldur. Í fyrstuni hevði tað givið honum 21.853,56 krónur um mánaðin. Sum starvsaldurin hækkar, skuldi hann fáa ávikavist 22.635,13 krónur, 23.379,99 krónur, og at enda, 24.241,18 krónur um mánaðin.

## Sjúklingar tiknir til gísla í verkfallinum

SJÚKRAFLUTNINGUR
*Áki Bertholdsen*

Ósemjan um løn hevur ført við sær, at nú er eisini allur sjúkraflutningur lagdur lamin í verkfallinum hjá Skipara- og Navigatørfelagnum

Nú hevur verkfallið hjá Skipara- og Navigatørfelagnum eisini rakt sjúkraflutningin.

Tá ið verkfallið varð lýst hósdagin, varð samstundis boðað frá, at sjúkraflutningurin um Vestmannasund og um Skopunarfjørð, vórðu undantiknir.

Seinni var hetta víðka, so at sjúkraflutning við øllum strandfaraskipunum var undantikin og sostatt hava skiparar- og stýrimenn verið umborð á skipunum alla tíðina, til reiðar at sigla sjúklingar og læknar.

Men Ósemja ímillum Fíggjarmálastýrið og Skipara- og Navigatørfelagið um lønina hjá manningini, hevur ført við sær, at Skipara- og navigatørfelagið hevur biðið skiparar og stýrimenn fara til húsar.

Skipara- og Navigatørfelagið krevur, at skiparar og stýrimenn skulu fáa vanliga løn fyri at vera til taks at sigla ið sjúklingum.

Harafturat skulu teir fáa vanligt gjald fyri tilkalling fyri tíðina, sum er uttanfyri vanligu ferðaætlanina hjá skipunum, og tað gjaldið er 17 krónur um tíman vanligar dagar og 34 krónur sunnu- og halgidagar.

Hinvegin vil Fíggjarmálastýrið bara betala teimum gjaldið fyri tilkallingina.

Tað endaði við, at Skipara- og Navigatørfelagið bað Fíggjarmálastýrið vátta, at menninir skuldu fáa vanliga løn fyri at vera til reiðar at sigla við sjúklingum.

Og tá ið hendan váttanin ikki var komin á miðdegi mikudagin, fóru allir skiparar og stýrimenn av skipunum og sostatt helt eisini allur sjúkraflutningur uppat.

Skipara- og Navigatørfelagið geva hvørjum øðrum skyldina fyri hetta. ( sí aðrar greinar í blaðnum)

# Vit skulu sjálvir áseta lønina

*– At Fíggjarmálastýrið ikki vil gjalda skipara og stýrimonnum løn fyri sjúkraflutning, harmast vit í FSN um, men at halda fólki til arbeiðis, uttan at rinda teimum løn, tað er ov mikið, og tí hava skiparar og stýrimenn fingið boð um at fara av skipinum, sigur Skipara og Navigatørfelagið*



VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– Hetta er nakað, sum Fíggjarmálastýrið má taka á seg, sigur Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum.

– Tað er Skipara- og Navigtørfelagið, sum er í verkfallið, so abyrgdin má vera teirra, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

– Vit skulu gera púrasta greitt, at eingin sáttmáli er galdandi fyri limir okkara. Men vil arbeiðsgevarin kortini brúka arbeiðsmegina, er tað løntakarin sum ásetir samsýning sína, sigur Skipara- og Navigatørfelagið.

– Hetta er ein løgfrøðilig grundregla, sum bæði er staðfest í lógfrøðiligum lesnaði og fleiri dómum, leggur felagið afturat.

Ellintur Abrahamsen sigur, at tey fara sjálvsagt ikki at slaka í hesum kravinum, tí menninir eru bundnir at skipinum á sama hátt, sum frammanundan.

Hann sigur, at tað var beinanvegin lýst við, at menninir vóru tøkir til sjúkraflutning, men at teir ikki vóru tøkir at hava tilkallivakt ta tíðina av samdøgrinum, tá ið skipini annars skuldu sigla eftir vanligari ferðaætlan

– Tað at Fíggjarmálastýrið ikki vil gjalda skipara og stýrimonnum løn fyri sjúkraflutning, sum undantak varð gjørt fyri, harmast vit í FSN um, men at halda fólki til arbeiðis, uttan at rinda teimum løn, tað er ov mikið, og tí hava skiparar og stýrimenn fingið boð um at fara av skipinum.

– Men vil Fíggjarmálastýrið vil rinda skipara og stýrimonnum løn fyri sjúkraflutningin, so eru teir klárir at fara aftur til arbeiðis, sigur Ellintur Abrahamsen.



Bústaðarneyð:

# Ongastaðni at búgva

**Eyðbjørg Hentze í Havn hevur ongastaðni at búgva. Hon hevur í meir enn eina viku livað uttan nakað heim saman við 18 ára gamla soninum. – Eg havi kært mína neyð hjá øllum avvarðandi myndugleikum, men eingin hjálp er at fáa, sigur hon**



*Eyðbjørg Hentze stendur nú á gøtuni. Hon hevur ongastaðni at búgva, hóast hon hevur leitað og heitt á myndugleikarnar um at hjálpa sær. Bústaðartrupulleikin í Havnini er nú so stórur, at myndugleikarnir mugu gera nakað ítøkiligt at bøta um trupulleikan*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

BÚSTAÐARNEYÐ
*Stefan í Skorini*

Bústaðarneyðin í Havnini er stór. Fólk hava ilt við at finna bústað, tí nógv onnur eru um boðið, og onkuntíð koma fólk illa fyri vegna bústaðartrot. Hetta hevur Eyðbjørg Hentzte í Havn veruliga kent sviðan av.

Fyri einari viku síðani skuldi Eyðbjørg flyta úr íbúðini, har hon hevði búð í tvey ár. Eigarin av íbúðini vildi hava tey út hiðani beinanvegin, tí annar leigari skuldi inn at búgva.

Hóast hon hevur verið hjá øllum avvarðandi myndugleikum, havt lýsingar í bløðunum og annars roynt av øllum alvi at fáa eina íbúð tilvega við at ringja runt í Havnini, hevur tað ikki eydnast henni. Hon og sonurin eru nú at kalla heimleys. Orsøkin er, at ongar íbúðir fáast fyri sámiligan prís í miðstaðarøkinum.

– Eg havi tosað við býráðið í Havn um trupulleikan, men har var eingin hjálp at fáa. Síðani havi eg tosað við Almannastovuna, men av tí at eg eigi nakað av peningi, so kann Almannastovan ikki veita mær ein bústað, sigur ein vónsvikin kvinna.

Hon hevur eisini vent sær til fleiri politikarar, sum nú undan valinum dyrgja óført eftir atkvøðum við at lova bæði eitt og annað, men eingin teirra hevði møguleika at loysa henda ítøkiliga trupulleikan.

Heldur eingin politikari hevði nakra haldgóða loysn, og nú stendur hon á gøtuni saman við soni hennara.

Hon hevur einki at missa, og tí fer Eyðbjørg nú til fjølmiðlarar at kæra sína neyð.

### Í trongstøðu

Inntil fyri tveimum árum síðani arbeiddi Eyðbjørg sum dagrøktarmamma í egnum húsum. Vegna hjúnaskilnað flutti hon úr húsunum og niður í íbúðina í kjallaranum. Tá bar ikki til at vera dagrøktarmamma longur, og síðani tá hevur hon einki arbeiði havt. Áðrenn tað arbeiddi hon sum hjálparfólk í Mjørkadali.

– Eg vil fegin út á arbeiðsmarknaðin at arbeiða, men tað er torført at finna eitt arbeiði, tá eg ikki havi nakran fastan bústað, og eg tori ikki at søkja uttan bústað.

Nú hon einki heim hevur, liggja ognir og lutir hennara spjaddir runt í Havnini. Nakað liggur í posum hjá grannanum, meðan innbúgvið stendur á loftinum á Tórshavnar Skipasmiðju.

– Nú gangi eg við matinum í ryggsekkinum. Hetta kann samfelagið ikki bjóða einum fólki, tí eingin eigur at koma í eina slíka støðu, sigur Eyðbjørg, eftir at hon rættiliga er komin í trongstøðu.

Hon og sonurin hildu til á Sjómansheiminum í Havn í nakrar dagar, men hetta er eingin haldgóð loysn í longdini, og tað var alt ov kostnaðarmikið at gista har í fleiri dagar.

Nú er hon givin við at lýsa í bløðunum, tí einki kom burturúr, men hon roynir framvegis at ringja til ymisk fólk, ið hava íbúðir til leigu.

### Eingin hjálp at heinta hjá tí almenna

Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, sigur, at kommunan og býráðið einki kunnu gera fyri at hjálpa, tá fólk koma í slíka trongstøðu.

– Vit fáa slíkar áheitanir at kalla hvønn dag, men vit kunnu bara bera tey tungu boð, at her er tíverri eingin hjálp at heinta, sigur Jan Christiansen. Býráðið hevur nakrar heilt fáar íbúðir til leigu, men hesar eru fyri langari tíð síðani upptiknar.

Hann heitir í hesum sambandi á landsins lóggevandi myndugleika um at smíða lógirnar soleiðis, at hesin trupulleikin verður loystur.

Tað skal gerast við at broyta MVG-lóggávuna, skattalógina og lógina um rentustuðul. Í dag er tað soleiðis, um ein privatur fer undir íbúðabygging, fær hann MVG av lønini til arbeiðsfólk afturgoldið. Hetta skal eisini vera galdandi, tá almennir grunnar fara undir slíka bygging.

Harumframt fær eigur skattalógin at verða broytt, so at ein almennur ella privatur grunnur ikki skal rinda skatt av yvirskotinum, sum tað hevur av at byggja og leiga íbúðir út. At enda skulu slíkar byggingar eisini fáa rentustuðul. Um hesi tiltøk verða sett í verk, hevði tað elvt til, at fleiri leiguíbúðir høvdu verið bygdar.

Hann vísir á, at ein grunnur, sum Húsalánsgrunnurin og kommunan hava latið hálvaaðru millión hvør í, hevur í hyggju at byggja 60 leiguíbúðir á Berjabrekku. Trupulleikin er tó, at tað verður ringt at fáa eina slíka verkætlan at bera seg við verandi lóggávu.

Borgarstjórin er nú spentur at síggja, um nýggja tingmanningin fer at gera nakað ítøkiligt við trupulleikan, tí øll valevni hava lovað at gera nakað við støðuna. Trupulleikin er stórur, ásanna øll, men enn er einki munagott gjørt við støðuna.



*Jan Christiansen, borgarstjóri, vónar, at nýggja tingið fer at loysa bústaðartrupulleikan í høvuðsstaðnum. Hann sigur, at fólk javnan seta seg í samband við kommununa at kæra sína neyð, men har er eingin hjálp at fáa*







